


# Káin og Ábel - nýtt tilfar til undirvísingina í kristni

TÍÐINDASKRIV FRÁ FØROYA SKÚLABÓKAGRUNNI

Føroya Skúlabókagrunnur hevur givið nýtt og fjølbroytt tilfar út til undirvísingina í kristni, har serligur dentur verður lagdur á at viðgera siðfrøðilig evni. Tilfarið er samansett av grundbók, næmingabók (arbeiðsbók) og lærarahefti og er ætlað framhaldsdeild fólkaskúlans og miðnámsskúlum.

Grundbókina Káin og Ábel - ein mýta um tveir brøður hevur Marjun Bæk, prestur, týtt úr norskum eftir prestin og rithøvundin Paul Leer-Salvesen.

Hetta er søga til ung, ið byggir á bíbliusøguna um brøðurnar Káin og Ábel og lív teirra. Marjun Bæk og Karolina Matras, lærari, hava, við upprunafrásøgnini úr Bíbliuni og týddu søguni til ung sum útgangsstøði, gjørt undirvísingartilfar, ið ger tað áhugavert hjá lærarum og næmingum at viðgera siðfrøðilig evni í teimum eldru flokkunum. Farið verður víða um, nógvar ávísingar eru til viðkomandi bíbliutekstir, og nortið verður við nógvar stórar spurn-ingar. Eisini ber til at fara í dýpdina og viðgera okkurt einstakt evni nágreiniliga.

Vónin er, at fjølbroytnið í tilfarinum styrkir um møguleikarnar at nýta mongu evnini í øðrum lærugreinum eisini, t.d. í føroyskum, donskum, søgu/samtíð og í tvørgreinaligum lesnaði og verkætlanum.

Marjun Bæk og Karolina Matras hava gjørt læraraheftið, har upplýsingar eru um bíbliutekstir, arbeiðsuppgávur og eyka lesnað. Hanne Jacobsen, studentaskúlalærari, hevur skrivað frágreiðingar og gjørt uppgávur til myndagreining. Næmingabókin hevur 7 høvuðsevni, ið øll viðgera siðfrøði.

Hetta er arbeiðsbók við uppgávum, bæði til bíbliutekstir og søguna um Káin og Ábel, men eisini til greining av myndum. Til hvørt av høvuðsevnunum í næmingabókini eru prentað tvey listaverk, ið kunnu knýtast at søguni um Káin og Ábel, men eisini nýtast sum myndatilfar og lýsa siðfrøðiligu evnini meira alment. Næmingabókin er tí prýðilig bók, við málningum frá ymiskum tíðarrákum í listasøguni.

Grafik Studio hevur gjørt permuna. Hestprent hevur prentað. Bøkurnar fáast frá Bókamiðsøluni og bókabúðunum. Grundbókin er 78 blaðsíður og kostar 96 krónur, næmingabókin er 37 blaðsíður og kostar 96 krónur, og læraraheftið er 36 blaðsíður og kostar 75 krónur.

VIÐMERKINGAR

# Bleiv fólksins sangskattur grivin niður á ólavsøku?

Ólavur Hátún



Tað heldur Heri Simonsen í Sosialinum seinasta leygardag. Atfinningar eru besta treytin fyri bata, men eg kann ikki so beinanvegin halda við Hera í hesum hansara pástandi. Av teim 20 sangunum í heftinum "Syngið við!" vóru 8 teir somu sum í fjør, og 9 aðrir hava gingið aftur í ólavsøkusangheftum frammanundan. Tríggjar nýggjar sangir tóku vit við í ár á fyrsta sinni: *Tað brenna túsund ljós í nátt* hjá Hans A. Djurhuus, sum Eyðun á Lakjuni hevur gjørt eitt so sera fitt og nútíðarligt lag til, *Hvør er tað, sum har kemur lætt titandi um teig* hjá Oskari Hermansson við lagi eftir Christian Wahl, sum sangfólk bæði í fjør og í ár ráddu mær til at fáa við inn í hetta ólavsøkusangúrval, og so *Øskudólgur og sópingarkona,* ið sum væntað gekk sera væl.

Munnu ikki fleiri taka undir við teirri áskoðan, at letur tú ikki nýggjari sangtilfar eisini sleppa framat, so stirvnar hesin sangur í tí vanabundna og hevur minni framtíð fyri sær ? Av teim 17 sangunum, sum Heri við røttum sigur, at føroyingum dámar at syngja, kunnu vit nevna, at t.d. "Aldan", "Kaga upp í himmalin", "Morgun" og "Í nátt eg droymdi" eru nýggjari sangir, ið júst midnáttarsangurin á ólavsøku man hava gjørt sítt til, at teir hava vunnið sær fótafesti í felagssangi í Føroyum.

Fleiri av hesum nevndu sangum hava tó nú verið sungnir so nógv uppísaman ár um ár, at fólki man vera farið at leiðast við hesar endurtøkur. Teir eru tó ikki niðurgrivnir, fyri tað um teir eisini geva pláss fyri øðrum.

Sjálvandi kunnu áskoðanir vera so ymiskar um songúrvalið, men mín sannføring er, at tann stóri bágin til tess at fáa hesa songløtu at hanga væl saman er, at vit ikki enn hava fingið loyst teir teknisku trupulleikarnar til fulnar. Hoyri t.d. fólk siga, sum stóðu við Føroya Sparikassa, at tey illa fingu fylgt við í sanginum, tí ongin hátalari var har á leið. Í fjør varð funnist at, at kórsangararnir gjørdu ov nógv um seg í hátalarunum og tóku sanghugin frá fólki. Tað var ikki so løgið, tí mikrofonirnar, bæði tann hjá útvarpinum og tann út til sangøkið, stóðu inni millum sangararnar. Í ár gjørdist trupulleikin tann øvuti, at sangstuðlarnir komu at standa ov langt burtur frá mikrofonini, av tí at vit ikki nóg væl frammanundan høvdu tryggjað sangarunum plássið undir Tinghúsinum, og teir fingu tí ikki á ynskiligan hátt høvi til at birta uppundir og virka til tamarhald á hesi ovurstóru sangarafjøld.

Trongdur upp í krók í fólkarúgvuni formáddi einstaklingurin sær ikki so nógv við sínari handmikrofon. Tað er væl heldur ikki ynskiligt, at einmansrødd skal gella millum húsini, heldur tað at syngjandi bólkur hoyrist, sum øll fjøldin kann sameina seg við.

Ikki var tað sørt, at eisini "Ormurin Langi" fekk tekniskar trupulleikar í ár, og samanumtikið áttu allir avvarðandi partar at funnið saman í fyrireikingini av hesum risatiltaki, sum enn tykist hava stóran áhuga hjá fólki.






# Føroyatúrurin avgerandi týdning



*Býráðið í Klaksvík var vertur við vitjanina hjá mentanarnarnevnd Norðurlandaráðsins í Klaksvík. Frá vinstru: Lars Wegendal, formaður í nevndini, Torleif Sigurðsson, varaborgarstjóri, Jórun Høgnesen, formaður í mentanarnevndini hjá býráðnum og Jógvan við Keldu, sum er føroyska umboðið í norðurlendsku nevndini*

**- Vit eru sera hugtikin av føroyskari mentan og sterka viljanum hjá føroyingum at yvirliva sum tjóð, segði Lars Wegendal, formaður í mentanar- og útbúgvinarnevnd Norðurlandaráðsins, tá nevndin var á vitjan í Føroyum í seinastu viku. Á ferðini vitjaðu tey eisini í Fuglafirði og Klaksvík**

NORÐURLANDA-RÁÐIÐ
*Rúna Sivertsen*

Formaðurin í mentanarnevnd- og útbúgvingarnevnd Norðurlandaráðsins, Lars Wegendal, segði, at á føroyatúrurinum hevur nevndin fingið týdningarmiklar og virðismiklar frágreiðingar um føroysk viðurskifti, sum koma at verða grundleggjandi fyri framtíðar støðutakanir.

Jógvan við Keldu, føroyska umboðið í nevndini, sigur, at forstáilsi millum fólkasløg er av størsta týdningi og at túrinin hjá hesum fólkunum, sum sita í teimum avgerandi sessunum í grannalondum okkara, hevur givið teimum betur fatan av, hvat hevur týdning og er neyðugt fyri okkara lítlu tjóð.

Eftir fundin í Havn, fór mentanar- og útbúgvingarnevndin hjá Norður-landaráðnum til Fuglafirðar og síðani varð vitjað í Klaksvík.

## Fuglafjørður nógv at bjóða

Á skránni í Mentanarhúsinum í Fuglafirði var borðreitt við vísusangi. Talan var um tveir sangir hjá Evert Taube, sungnir á føroyskum av Niels Midjord og Petur Jakku Eliasen. Sangur teirra hugtók formannin í nevndini.

Frits Johannesen luttók við Fuglafjarðar sangkóri, síðani spældi eitt poporkestur av evnaríkum ungdómum. Ein góð løta gekk við frágreiðingum um nýggja mentanarhúsið, og limir Norðurlandaráðsins vóru hugtiknir av hesum húsi og teimum tiltøkum, sum har hava verið.

Lars Vegendal helt fyri, at tað var ófatuligt, at eitt so lítið samfelag sum Fuglafjørður, kundi hava eitt so prýðiligt og vælhóskandi mentanarhús.



*Á matstovuni Fortuna, var borðreitt við føroyskari og útlendskari matskrá. Formaðurin, Lars Wegendal, í práti við Tórleif Sigurðsson, varaborgarstjóra í Klaksvík*

## Væl fyrireikaður klaksvíkstúrur

Í Klaksvík tók býráðið ímóti. Torleif Sigurðsson, varaborgarstjóri, beyð vælkomið.

Dávur Winther hevði síðani góða og áhugaverda frágreiðing á powerpoint um Klaksvík, og tað virði Klaksvík hevur í føroyska samfelagnum, bæði vinnuliga og mentanarliga.

Býráðið beyð síðani til morgunmatar á Fortuna við føroyskari- og útlendskari matskrá. Onnur tiltøk vóru vitjan í Christianskirkjuni, har Andrass Sólstein, greiddi frá og á Fornminnisavninum, har Jógvan Ravnsfjall, leiðari, var frásøgumaður.

Nøkur fóru siglingartúr við Draganum norður um, har tey lógu og nutu Føroyar í fagrasta veðrið. Tey vóru sera hugtikin av føroysku náttúruni.

Eisini hildu tey fyri, at tað mundi liggja stórt arbeiði í at fáa Dragan til tað, hann er í dag. Um kvøldið var Føroya kvøld í Skálanum, sum Klaksvíkar Dansifelag legði til rættis.

Anfinn Jacobsen, sjónleikari, greiddi væl frá føroyska dansinum, og 17 sangarar sungu norðurlendskar sangir.

## Eyguni upp fyri grindadrápi

Andras Joensen vísti síðani nýggja "grindafilmin", sum gav gestunum eina greiða fatan av, hvønn týdning grindin hevur fyri Føroyar, og øll vóru samd um, at hetta gav eina góða og øðrvísi mynd av grindadrápinum.

Jógvan Ravnsfjall greiddi frá um føroysku ullina, og onkur listarkvinna úr Svøríki, tók nakað av føroyskari ull við sær heim til Svøríkis.

Tað er neyvan ilt at gita, at føroyska umboðið í nevndini, Jógvan við Keldu, hevur havt "ein fingur við í spælinum", tá ferðin til heimbý hansara varð løgd til rættis.



## Skipsurið

Tað hongur eitt skipsur á skottinum
er farið um hundrað ár
tað slær síni vælkendu syngjandi løg
ið ei vikast vetur sum vár.
Her sótu teir gomlu - her vit sita nú
og framvegis urið tað melur
toli og tógvi, tað árvaki er
og vaktirnar setur og telur

Tað skipsurið "gongur" á bakborðssíðu,
sá manningar koma og fara
teir upp gjøgnum leytaran tungliga traðka
út í hundavaktstímar at stara
Vísarin fjakkar mót morgunvakt
og aðrir í leytaran stíga.
Sóðust á dúrkinum sjómóðir menn
ið troyttir um koyggjukarm glíða
------------------
Her faðir og synir - skiftandi ættir
urið teim fylgdu og ongan tað sveik.
Tá stórbrot tey gingu so dekksplankar brattir
reistist úr bylgjum tann eldgamla eik.
Rok yvir fokku og klyvaran bardu,
skúmandi froðan á rigningar gekk.
Harðvunnar hetjur tó siglaran vardu.
Álvarsamt urið á skottinum hekk
-----------------
Tað melur ein skrúva í døkkum dýpi
síni valkendu sløg hon slær,
vit kenna tað allir tað vælkenda sjóð
sum skip várt um høvini bar.
Kám eru sjókort av hart royndum hondum
sum ótaldar kósir um høv funnu har.
Tolnast av øllum var skipsurið gamla
í hundrað ár mynstra á skipinum var.

**Viggo Johannesen**